TING-HELLAN

# stjórnarskipan



*Føroyingar kunnu eisini fáa íblástur frá amerikansku stjórnarskipanini í sambandi við arbeiðið at smíða eina nýggja føroyska stjórnarskipan, sum kann veita støðugleika og virkni*



*Teir amerikonsku stjórnarskipanarsmiðirnir evnaðu til eina skipan, sum var eitt gjøgnumbrot í áhaldandi stríðnum fyri frælsi*

tríggjar sjálvstøðugar deildir: lóggávudeild, útinnandi deild og dómsdeild.

Teir smáu statirnir góðtóku ikki Virginia-ætlanina, tí teir bóru ótta fyri, at áhugamál teirra fóru ikki at verða røkt. Sambært Virginia-ætlanini átti umboðanin í lóggávutinginum at verða avgjørd av skattaupphæddini, sum bleiv rindað til meginstjórnina. William Paterson úr New Jersey legði fram, umboðandi smáu statirnar, eitt alternativt uppskot til tess at varðveita sterka leiklutin hjá statunum. Alternativið verður kallað New Jersey-ætlanin. Allir statir skuldu, sambært uppskotinum, hava somu umboðan í einum eittkamar tingi. Hetta uppskot fekk ikki undirtøku, men smáu statirnir høvdu tó nóg nógvan stuðul til tess at fáa í lag eina neyðloysn viðvíkjandi spurninginum um umboðan í lóggávutinginum. Ein nevnd varð vald til at loysa ósemjuna, og úrslitið gjørdist The Great Compromise. Sambært hesum uppskoti skuldi umboðanin í umboðsmannatinginum verða grundað á fólkatalið í statunum, meðan umboðanin í senatinum var líka hjá øllum statunum, nevniliga tveir senatorar hvør. Nógvar aðrar ósemjur vóru, og fleiri aðrar neyðsemjur vóru gjørdar áðrenn stjórnarskipanaruppskotið varð latið úr hondum í september í 1787. Eftir at New Hampshire sum nýggjundi staturin góðkendi stjórnarskipanina, kom hon í gildi 4. mars í 1789.

## Orðaskiftið og The Federalist Papers

Tá ið stjórnarskipanin varð latin statunum til góðkenningar, byrjaði eitt stórt ament orðaskifti. Tey, sum vóru ímóti stjórnarskipanini, nevndir antifederalistar, mettu, at nýggja stjórnarskipanin tók ov nógv vald frá einstøku statunum og gjørdi samveldisstjórnina alt ov sterka, so at persónliga frælsið, ið tey høvdu stríðst fyri, fór at koma í vanda. Til tess at koma hesum ákærunum til lívs, lovaðu federalistarnir, teir, sum stuðlaðu stjórnarskipanini, at staðfesta hesi frælsisrættindi eftir at nýggja stjórnarskipanin var staðfest. Úrslitið gjørdist tey fyrstu tíggju ískoytini til stjórnarskipanina, nevnd Bill of Rights, og komu hesi í gildi 15. desember í 1791. Besta próvførslan fyri teirri amerikonsku stjórnarskipanini er savnað í The Federalist Papers, ið var ein røð av greinum, sum vóru prentaðar í bløðum í New York frá oktober 1787. Greinarnar vórðu skrivaðar undir dulnevninum Publius. Høvundarnir vóru Alexander Hamilton, James Madison og John Jay, sum høvdu havt stóra ávirkan í stjórnarskipanarsmíðinum og vóru ídnir talsmenn fyri teirri nýggju stjórnarskipanini. The Federalist Papers vísir ikki bara, hvussu stjórnarskipanarsmiðirnir fataðu skipanina, tá ið teir skrivaðu hana, men eisini hvussu fólkið í USA fataði nýggju grundleggjandi lógina, tá ið tey góðkendu hana. The Federalist Papers er ein framúrskarandi greining av teirri amerikonsku stjórnarskipanini, ið ikki finnur sín líka, og sum avgjørt hevur uppiborið sítt pláss sum klassikari innan politisk ástøði.

## Ávirkan av teirri amerikonsku stjórnarskipanini

Teir amerikonsku stjórnarskipanarsmiðirnir evnaðu til eina skipan, sum var eitt gjøgnumbrot í áhaldandi stríðnum fyri frælsi. Tann amerikanska stjórnarskipanin hevur havt stóra ávirkan á sera nógvar stjórnarskipanir kring heimin.

Eyðsæð er, at einki land merkti avleiðingarnar av kollveltingini so beinleiðis sum Frakland gjørdi. Nógvir heryvirmenn tæntu í Amerika um tað mundið og fingu íblástur hertænastuni. Nevnast kann tann ungi Marquis de Lafayette, vinur Washingtons, sum, eftir at hava stríðst í Amerika, kom heim til Fraklands við einum ynski um frælsi og eini republikanskari sannføring. Hann var ein av teimum, ið stríddist fyri frælsi og javnrættindum í Fraklandi. Í 1789 varð Mannarættindayvirlýsingin samtykt í Fraklandi, og staðfesti hon politisk og borgarlig rættindi. Í september í 1791 fekk Frakland, eftir eina ógvusliga kollvelting, sína egnu stjórnarskipan, sum m.a. avmarkaði valdið hjá kongi. Thomas Jefferson rættaði eina kladdu av fronsku Mannarættindayvirlýsingini frá 1789, sum verður mett at vera eitt av teimum týdningamiklastu mannarættindaskjølum, sum eru skrivað. Hetta er bert eitt av fleiri dømum um ta amerikonsku ávirkanina á franska stjórnarskipanarsmíðið.

Tann amerikanska stjórnarskipanin gav ikki bara íblástur til onnur lond um tað mundið, tá ið skipanin varð sett á stovn. Í meira enn tvær øldir hevur tann amerikanksa stjórnarskipanin ávirkað og givið íblástur til stjórnarskipanir í óteljandi londum. Føroyingar kunnu eisini fáa íblástur frá amerikonsku stjórnarskipanini í sambandi við arbeiðið at smíða eina nýggja føroyska stjórnarskipan, sum kann veita støðugleika og virkni.